

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 05 - 2012

# Shell-floti nærkast Arktis

Ein av heimsins oljurisum, halendska oljufelagið Shell, er nú við at leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til at fara undir eina ta fyrstu stóru boriverkætlanina í Arktis, tvs. í Beufort-havinum og Chukchi-havinum norðan fyri Alaska. Ein heilur floti av pallum og skipum eru á veg til Arktis ymsasstaðni frá í heiminum. Har eru tvey boriskip og síðani umleið 35 ymisk veitingarskip. Millum hesi eru eisini spildurnýggir ísbrótarar bygdir í Finlandi. Nú um dagarnar fekk Shell fleiri nýggj loyvi og eftir eru nú bert tvey loyvi, áðrenn borurin kann setast í. Shell hevur júst fingið góðkent eina umsókn, sum skal tryggja, at hvalur og kópur ikki verður órógvaður av boriarbeiðinum. Tað eru nú nógv ár síðani, at Shell fór undir at fyrireika boring í Arktis. Felagið hevur møtt stóra mótstøðu frá umhvørvisverndarfelagsskapum, sum halda, at Shell er ikki ført fyri at forða fyri ella fáa tamarhald á eini dálkivanlukku. Ein umboðsmaður fyri Shell sigur, at felagið hesi seinastu 5-6 árini hevur brúkt 20 milliardir krónur uppá hetta arktiska ævintýrið. Hetta er gjørt í tí trúgv, at tað ber til at gera heilt stór fund í økinum.